# siglingarsøguni liðugt





n fer

Müller




*Nýggja Norrøna*

*Mynd Jens K Vang*

Norrønu til Noregs. Ætlanin var at koyra úr Bergen og til Keypmannahavnar og haðani og norður til Stokholm og so umvegis Oslo og aftur til Bergen. Tey eru ivaleyst fleiri, sum halda seg kenna lítið til Noreg og uppaftur minni til Svøríki. Koyritúrurin var framúr vakur, og ikki minst svenski høvuðsstaðurin var sonn perla at vitja.

Tey eru mong, sum á sovornum ferðum búgva á tjaldplássum ella í smáttum, og alt gott um tað. Hjá teimum, sum ynskja uppaftur betri komfort, ber til at velja gistingarhús. Á sumri, tá ið handilslívið heldur frí, eru prísirnir ikki so galnir. Serliga um bílagt verður í góðari tíð og yvir internetið. Fyrstu ferðirnar kennist tað sum spennandi avbjóðing at bíleggja á henda hátt.

Túrurin eydnaðist framúr væl, og hervið verður honum veitt besta skoðsmál.

## Skiftistíðin

At Smyril Line og Norrøna og slóðbrótandi rutan hava havt alstóran týdning fyri Føroyar er eingin ivi um. Í Google leitiskipanini verður víst til umleið 57.600 sambond, tá ið spurt verður eftir Smyril Line, og talan er um so ymisk mál sum japanskt, russiskt, spanskt, franskt, italskt, týskt, eingilskt, norðurlendsku málini og ivaleyst fleiri onnur eisini.

Fyri nøkrum árum síðani møtti eg ein vanligan føroyskan summardag við Løkin á Viðareiði fremmandum ferðafólkum. Maður og kona, farin um miðjan aldur, vóru har í bili. Tey vóru ættað suðuri úr Europa, og tey vóru á veg til Íslands. Ferðasambandið var soleiðis, at tað var neyðugt at bíða her í tveir dagar. Tey høvdu staðið og hugt vestur á Múlan, Nakkin og Kallin og eystur á Eystfellið. Í prátinum undraðust tey á, at tey mest sum av tilvild vóru komin til so náttúruvakurt land, sum tey ongantíð áður høvdu hoyrt um. Norrøna hevði so at siga parkerað tey her í tvey dagar, og tey søgdu seg ætla at ferðast aftur henda vegin á somu farleið. Ivaleyst eru nógvar søgur sum henda.

Nú fer Óli Hammer úr stjórasessinum í Smyril Line. Teir, sum hava sett í, vilja hava ávirkan á stjórnina, og tað er ikki so undarligt. Ofta er tað soleiðis, at undangongumenninir ikki gerast so gamlir í felagnum, eftir at tað er komið í trygga legu. Fyri nøkrum árum síðani visti eitt blað at siga, at í ikki fleiri enn 10 prosentum av førunum var sami stjóri í frískúlunum í Danmark fimm ár eftir, at farið varð undir skúlan, sum tann, ið upprunaliga setti sjøtul á. Um tað verður sæð upp á tað í tí ljósinum, so hevur fyrsti Smyril Line stjórin verið drúgvur.

Jóannes á Váli er framvegis stjóri í Smyril Line, og sum tað skilst skal gamli stjórin vera ráðgevi í felagnum í tvey ár, áðrenn hann leggur heilt frá sær. Harvið verður syrgt fyri, at vitanin og royndirnar higartil ikki fara fyri bakka, nú nýtt fólk skal setast í stjórnina.

Óli Hammer er ikki longur oddviti. Einki er at ivast í, at nú hann lítur aftur á lívsverkið, so kundi hann í onkrum førum hugsað sær at havt tikið aðrar avgerðir enn tær, sum vórðu tiknar, eftir at avleiðingarnar av teimum vóru vornar til veruleika og samfelagsgongdin annars var kend. Sovornar royndir eiga øll í vinnulívinum.

Í framúr góðu Hugbirtingum sínum tekur Petur Háberg, sáli, soleiðis til í umrøðuni av Ólavi av Heygum í Vestmanna, sum var oddviti, tá ið telefonin kom til Føroya, og har afturat var uppi í so mongum øðrum framtøkum:

"Onkur hevur sagt, at ein munur millum íslendingar og føroyingar er hesin: At skarar ein maður framúr fjøldini - veri tað seg innan fyri list, vinnu á landi ella sjóvinnu ella á annan hátt, so rokna íslendingar ein slíkan mann fyri eina tjóðskaparogn, sum teir kappast um at styðja og halda uppi. Í Føroyum afturímóti - lat ein mann skara framúr ella fáa høvdið eitt sindur hægri enn fjøldina - so eru nógvar kreftir til at happa og draga niður ein slíkan mann".

Tað man vera so ymiskt frá føroyingi og til annan føroying og frá íslendingi og til annan íslending, hvussu tað er við hesum. Nú framherjin fyrstu tredivu árini leggur frá sær, og harvið søguligt skeið í føroysku siglingarsøguni tykist vera lokið, vóru hesar reglur fátækslig roynd at seta ljóskastaran á stóra og hepna takið, sum tað hevur verið fyri Føroyar og føroyingar, at Óli Hammer saman við øðrum fór undir siglingina í Norðuratlantshavinum.



*Norrøna fekk heiðurliga móttøka, tá hon fyrstu ferð kom á Havnina*

*Mynd Jan Müller*